# Borgarstjórin býður samstarv

**Nýggi borgarstjórin í Miðvági, Napoleon Magnussen, mælir til víðkað samstarv millum kommunurnar í Vágum. Hann rør fram undir eina kommunusamanlegging í oynni**

KOMMUNUMÁL
*Edvard Joensen*

**Mivági:** Tað hendir so nógv rundan um okkum, at um vit skulu gera okkum nakrar hugsanir um at vera við í menningini, sum er, er neyðugt við víðkaðum samstarvi og kanska enntá eini kommunusmanlegging í oynni, sigur komandi borgarstjórin í Miðvágs Kommunu, Napoleon Magnussen.

Nývaldi borgarstjórin í Miðvági hevur sum eitt av málunum í komandi valskeiði at menna samstarvið millum kommunurnar í Vágum. Og hann er ikki avvísandi fyri eini møguligari kommunusamanlegging í økinum, sigur hann.



*Napoleon Magnussen verður borgarstjóri í Miðvágs Kommunu komandi valskeiðið. Varaborgarstjóri verður Malan Helgadóttir*

Hann hugsar í tí sambandinum eisini longri enn bara í Vágar. Nevnir møguleikan at seta ein arbeiðsbólk ella líknandi at kanna, hvørjir møguleikar kunnu fáast saman við eitt nú Vestmanna og Kvívík, uttan tó í tí sambandinum at fara so langt sum til beinleiðis samanlegging. Men samstarv má avgjørt vera møguligt har, heldur hann.

– Vit kunnu so undir ongum umstøðum liggja her og draga hvør í sína ætt, um vit skulu vænta at fáa nakað burtur úr hjá okkum, sigur Napoleon Magnussen. Tað skal ein størri eind til at klára seg, sigur hann og vísir til blokkarnar, ið eru at síggja allastaðni rundan um okkum, sum hann tekur til.

– Sundalagið er gingið saman í ein blokk, og Havnin breiðir seg norður til Kollafjarðar og út á oyggjarnar eisini. So vit noyðast at brúka okkara kreftir í felag, skulu vit vera við í menningin av samfelagnum, sigur hann.

Napoleon Magnussen sigur, at hesar hugsanir eru hansara egnu, og at tær ikki eru viðgjørdar í bygdaráðnum.

Tað er nokk at taka hondina í komandi fýra árini, sigur nýggi borgarstjórin í Miðvági.

Tað liggja óloyst mál, sum tíðin væl er komin til at fáa frá hondini, sigur Napoleon Magnussen. Eitt nú eru tað fleiri vegir, sum liggja soleiðis hálvlidnir. Bæði kommunalir vegir og leivdir frá privatum útstykkingum.

– Vit stillaðu upp á okkara lista við millum betri umstøðum til útróðrarmenninar sum einum høvuðsmáli, sigur Napoleon Magnussen. Og tað verður eisini eitt av aðalmálunum, sum farast skal undir, sigur hann.

Tað eru serliga teimum størru bátunum, trupulleikar eru av í verandi bátahyli. Tað er ikki pláss fyri teimum, sigur Napoleon Magnussen. Men tað er eingin trupulleiki at gera ein nýggjan hyl ella víðka tann verandi, so tað málið kann loysast skilagott, sigur hann.

– Og so mugu vit fáa gjørt tað soleiðis, at vit fáa ein stampagoymslu eisini. Tað kann ikki vera rætt, at tað ikki skal bera til at frysta ein stamp hesumegin vantið, sigur nývaldi borgarstjórin í Miðvági,

# Avgerðin liggur hjá aðalfundinum



**Nú er tað upp til eykaaðalfundin, sum lýstur er, um Smyril Line fær meira pening, sigur nevndarformaðurin**

FÍGGJARSTØÐA
*Edvard Joensen*

Tað er tungt, men tað gongur rætta vegin, sigur Klæmint Weihe, nevndarformaður í Smyril Line, um arbeiðið við at fáa til vega tann pening, sum fíggjarstovnarnir krevja av Smyril Line.

Hetlendingar hava sett góðar 30 milliónir krónur í felagið, og nú er tað so upp til eykaðalfundin hjá Smyril Line at gera av, um partaeigararnir í Føroyum og Íslandi eisini fara at seta einar 30 milliðónir av nýggjum partapeningi í felagið, sigur nevndarformaðurin.

Hann sigur, at viðurskiftini við fíggingarstovnarnar sum so eru komin upp á pláss. Men enn er einki endaligt undirskrivað, sigur hann.

Um Norrøna fer at sigla aðrastaðni restina av vetrinum, velst um, um Smyril Line fær annað skip at røkja rutusiglingina norðanfyri, til Norröna fer aftur í summarsigling. Men tað er nógv, sum bendir á at Norröna fer aðrastaðni at sigla í Vetur, sigur Klæmint Weihe, nevndarformaður.

# Nýggjur borgarstjóri í Miðvági



*Miðvágs Kommuna, sum fevnir um Miðvág og Vatnsoyrar, fær nýggjan borgarstjóra á nýggjárinum*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Nýggja bygdarráðið í Miðvági valdi á fundi mikukvøldið nýggjan borgarstjóra. Napoleon Magnussen loysir Jóan Paula Frederiksen av á nýggjárinum**

KOMMUNALPOLITIKKUR
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** Miðvágs Kommuna fær nýggjan borgarstjóra eftir nýggjár. hann eitur Napoleon Magnussen og loysir Jóan Paula Frederiksen, sum hevur sitið sum borgarstjóri seinasta valskeiðið, av á nýggjárinum.

Nýggja bygdarráðið í Miðvági hevði fund mikukvøldið, har borgarstjóri og varaborgarstjóri vórðu valdir. Til varaborgarstjóra varð vald Malan Helgadóttir, sum er einasta kvinna í komandi bygdarráðnum í Miðvági. Í tí fráfarandi vóru tær tríggjar. Men tvær teirra stillaðu ikki uppaftur. Malan Helgadóttir situr eisini í fráfarandi bygdarráðnum.

Tað eru tríggir listar umboðaðir í nýggja bygdarráðnum í Miðvági, og eingin teirra hevur meiriluta. Sjey bygdarráðslimir eru. Ein listi hevur tríggjar, og hinir báðir hava tveir limir hvør. Tað skuldu eisini trý umfør til, áðrenn borgarstjórin varð valdur. Og áðrenn tað kom so langt, hevði eisini eitt lutakast verið á vegnum. Napoleon Magnussen er valdur sjálvur annars á sínum lista.